## Mentamálaráðið
Aðalskrivstovan

Mentamálaráðið
Hoyviksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Tel. 35 50 50
Faks 35 50 55
mmr@mmr.fo
www.mmr.fo

### Løgfrøðingur/Fulltrúi

**Starvið**
Í sambandi við, at ein av løgfrøðingum okkara fer úr starvi, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum fulltrúi leyst at søkja í aðalskrivstovuni.

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:

- Lógarfyrireikandi arbeiði, kunngerðir og reglugerðir innan málsøkið
- Løgfrøðilig ráðgeving og vegleiðing til landsstýrismann, starvsfólk, stovnar og borgarar
- Vegleiðing og kunning um nýggjar lógir o.a.
- Umsiting av málsøkjum, sum verða løgd til tín
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð
- Aðrar uppgávur

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur løgfrøðiligt embætisprógv.

Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir úr øðrum starvi. Harumframt skalt tú bæði kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í arbeiðsbólkum o.ø.

**Vit bjóða**
- Spennandi starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir
- Sjálvstøðugt starv
- Samstarv við royndar løgfrøðingar
- Luttøku í løgfrøðiligum samstarvsmótum
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Arbeiðið er á einum høgum fakligum støði, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðinga-felagið.

Setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmans-skrivstovuna og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, C.V. o.ø skal sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 29. august 2005 kl. 16.00. Starvið verður at seta frá 1. oktober ella skjótast til ber eftir hetta.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 35 50 50.

*Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
*Í aðalskrivstovuni eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, HR, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin í Mentamálaráðnum er býtt í 3 deildir – fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild – sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.*

www.sansir.fo

## Lærlingar



Vit søkja eftir einum kokkalærlingi og einum tænaralærlingi.



Ring ella send eina umsókn

Gourmet v/Leif Sørensen
GR. KAMBANSG. 13 · TÓRSHAVN · TEL 32 25 25 - 21 75 75

## Kunngerð

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at kommunustýrið á fundi tann 22. august 2005 hevur samtykt at seta parkeringsforboð í gildi í Tjørnuvík á almennum vegi inni í bygdini fyri bilar yvir 3,5 tons.

Sunda kommuna

## Til Sølu — Opel Vectra 3,2 GTS



**Árg 04/2003 · km. 40.000**
**Til sølu um hóskandi boð fast**

**Tel 22 14 19**

## Rørsmiðjulærlingur

Til rørsmiðju okkara verður søkt eftir lærlingi, ið skilur týdningin av góðum handverki, dygd og er íðin eftir at læra.

Umsóknir skulu verða innkomnar seinast 8. september til:




**Maria Poulsen pf**
Boks 182 · FO-110 Tórshavn

Sosialurin 341800

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

## MAZDA 323F



**Frá apríl 1996, koyrt 130.000 km, grønur, v/powerstýring, aircondition, centrallás, CD/Radio, Alu-felgur, o.m.a.**
**Sera vælhildin bilur.**

**Selist um hóskandi boð fæst**

**51 13 75**

Sosialurin 341800

## Rørsmiðjum og handverkarum

Søkt verður eftir dugnaligum handverkarum, ið eru raskir og arbeiðssamir, til rørsmiðju arbeiðið.

Umsóknir skulu verða innkomnar seinast 8. september til:




**Maria Poulsen pf**
Boks 182 · FO-110 Tórshavn

Sosialurin 341800